








# Forvitnisligir filmar í heyst

TÁ **STORMURIN** LEIKAR Í UTTANFYRI, ER TAÐ **HUGNALIGT** AT FARA EIN TÚR Í **BIOGRAF**. BOMMPOSIN SKAL **SJÁLVANDI** VERA VIÐ HONDINA, OG EIN **GÓÐUR** VINUR UNDIR **LIÐUNI**. HER ERU TRÍGGIR **FILMAR**, SUM HAVA **FRUMSÝNING** Í SEPTEMBER, OKTOBER OG NOVEMBER



**FILMAR**
Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

**30. september** er Michael Douglas aftur sum Gordon Gekko í filminum »Wall Street: Money never sleeps«. Tað eru 23 ár síðani »Wall Street« filmurin kom, og hesa tíðina skal Gordon so hava sitið fongslaður. Nú er hann úti aftur og roynir at fáa samband við dóttrina, sum hann ikki hevur tosað við í nógv ár. Blívandi maðurin hjá henni og Gordon gerast vinir, og teir báðir saman gera aftur Wall Street eitt óvist stað at vera.

**14. oktober** hevur »The American« við George Clooney frumsýning. Filmurin er um leigudrápsmannin Jack, ið ferðast um allan heimin í sínum arbeiði. Ein uppgáva í Svøríki endaði illa, og Jack fer til Italia at goyma seg. Har kemur hann í samband við vøkru Claru og prestin Father Benedetto, meðan hann er í Italia verður hann biðin at gera eitt vápn til mystisku Mathilde.

**11. november** hevur »Spis, Bed, Elsk« frumsýning við Juliu Roberts í høvuðsleiklutinum. Tað er ein sonn søga um Liz Gilbert, ið rýmur frá einum óintressantum gerandisdagi og fer út á eina áralanga ferð til Italia, India og Bali har hon etur, biður og elskar. Liz Gilbert skrivaði eina bók um sína ferð, og tað er metseljandi bókin, ið nú er gjørd um til film.

Julia Roberts segði í einari samrøðu fyri stuttum, at hon tók fimm kilo uppá, meðan fimurin var gjørdur í Italia.

»Spis, Bed, Elsk« er ein filmur um at uppliva lívið, og at lata eyguni upp fyri tí, sum er rundan um okkum.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **SMÍL! SMÍL!**
4 SAMRØÐA: **VINIR Í LAKSAFISKISKAPI**
6 TIPS: **HULA HULA RINGURIN**
8 TIL ARBEIÐIS: **ELISABETH EGHOLM**
10 10 TING UM **FREDERIK REINFELDT**
11 90 SEKUND: **EYÐFINN REYÐBERG**
12 40 ÁR SÍÐANI **FLOGVANLUKKUNA Í MYKINESI**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 POLITISKT KJAFTASLIT **UPP UNDIR EVSTAMARK**
18 ÚTISETIN: **KRISTINA S. HANSEN**
19 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **HEYSTIÐ ER KOMIÐ**

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Eyðbjørg Mikkelsen / Álvur Haraldsen

**KLUMMAN**



*Randi Jacobsen*

# Smíl, smíl!

Mín áskoðan er, at flestu menniskju um allan heim eru fyrikomandi og hampafólk. Hini eru undantøkini.

Men ymist er frá landi til land, hvussu blídlig fólk eru, og hvussu lætt tey eru at koma í samband við. Tað er ymiskt, hvussu hugburðurin er til onnur menniskju.

Fyri stuttum kom eg heim aftur úr Kroatia, úr vakra og hugnaliga býnum Dubrovik, og eg má ásanna, at ikki í nøkrum landi havi eg møtt so blídligum fólki. Í tíggju dagar høvdu vit ikki eina einastu neiliga uppliving.

Landið er heimskent fyri blíðskap. Á uppsløgum stendur, at smíl kostar einki, og tað er jú satt.

Skuldu vit inn í ein buss, góvu tey pláss fyri okkum sum útlendingum. Inni í bussunum stóðu uppsløg við áheitan um at reisa seg fyri foreldrum við smábørnum, barnakonum og gomlum fólkum. Hetta livdu tey eisini upp til. Kom eitt eldri ella rørslutarnað menniskja inn í yvirfylta bussin, var beinanvegin ein stólur tøkur. Einki við at skumpa og troðka.

Í øllum handlum vóru fólk blíð og einki við at ilskast, tá ið fólk komu inn uttan at keypa nakað.

Landið marknaðarførir seg við at vera eitt blítt land, og við endurbyggingini eftir kríggið, tá ið Jugoslavia datt sundur, er stórur dentur lagdur á at hava góðar umstøður til rørslutarnað. Eitt kríggj í einum landi førir jú til nógvar invalidar.

Tann, sum upplivir slíkt, verður upp á sama máta. Tí kendist tað ikki sørt løgið í flogfarinum, har heldur trongt var, tá ið vit skuldu í land, at ein donsk kvinna goyði, tí hon ikki slapp vegin fram fyri fólki, tí hon hevði ikki tol til at bíða.

Kanska hevði tað verið eitt hugskot at sent onkrar føroyingar, sum sita í móttøkum, ein túr til Dubrovnik at lært seg hetta slagið av fólkaskikki. Størri blíðskapur í einum landi skaðar ikki. Haraftrat áminningin um, at rúm skal vera fyri øllum, ungum og gomlum, høltum og blindum.



TILVILDARLIG MYND